# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Omanlop í Vágsbotni




*Bilurin hjá Bárði Nielsen, stjóra í Stórutjørn, sá knapt so gott út, aftan á at grót var lopið omanyvir hann í Vágsbotni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Seinnapartin í gjár var sjáldsamt omanlop. Sjáldsamt, tí hetta hendi niðri í sjálvari Havnini á Bryggjabakka í Vágsbotni. Tíbetur var onki fólk á staðnum, tá tað hendi, men tveir bilar fingu skaða**

OMANLOP
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í føroysku náttúruni eru omanlop alt annað enn ókend fyribrigdi. Heldur ikki oman yvir bygdir, men um hetta nakrantíð er komið fyri inni í bygdum øki - tiansheldur mitt í Havnini - man vera ivasamt.

Seinnapartin í gjár leyp grót úr sjálvum Bryggjubakka í Vágsbotni oman yvir eitt parkeringspláss, har nakrir bilar stóðu parkeraðir.

Tíbetur hendi ongin mannskaði, men grótið gjørdi skaða á tveir bilar. Serliga tann eini bilurin fekk fitt av skaða. Talan var um ein jeep-líknandi bil hjá felagnum aftanfyri Stjórutjørn, sum er stjórabilur hjá Bárði Nielsen, ið sum kunnugt er fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Skaðin á bilin hjá Bárði Nielsen var tó ikki størri enn so, enn at hann kundi koyrast beinleiðis á verkstað til umvælingar.

Av tí at lopið er undan garðinum í Rektaragøtu, hevur kommunan fyribils sett betongsperrur upp, so ferðslan eftir gøtuni ikki elvir til, at tað lýpur meiri grót undan. Harafturat eru betongsperrur settar út á parkeringsplássinum, so ongin fær parkerað á økinum og harvið koma í vanda, um tað skuldi lopið meiri grót undan.

Boði Haraldson, býarverkfrøðingur, sigur, at ætlanin er gera eina verju uppundir verandi gar, sum er einar 30 metrar langur.

- Garðurin er gamal, og tí vita vit ikki, hvussu væl hann er armeraður, og hvat hann sostatt kann halda til, sigur býarverkfrøðingurin.

Økið er privat ogn, og tí skal eisini finnast útav, hvør skal gjalda fyri ábøturnar.

- Í fyrstu atløgu er tað týdningarmiklasta, at vit tryggja økið. Spurningin um hvør kemur at gjalda, mugu vit so venda aftur til, sigur Boði Haraldson.



*Fitt av gróti leyp undan Rektaragøtu á Bryggjubakka oman yvir parkeraðar bilar í Vágbotni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

TOYOTA

**Hjálparleiðari** til plátuverkstaðið

Til vælútgjørda plátu- og lakkverkstað okkara søkja vit eftir einum hjálparleiðara at byrja skjótast til ber. Arbeiðið, ið er fjølbroytt og avbjóðandi, fevnir m.a. um:

- Tilrættarlegging av arbeiðsuppgávum
- Kundatænastu
- Umsiting av skaðasýnum
- Fakturering
- Annað fyrifallandi, sum leiðarastarvið inniber

Arbeiðið sum hjálparleiðari er bæði fjølbroytt og avbjóðandi. Afturat tær fært tú eitt úrvalslið av starvsfeløgum, ið tilsamans mynda kjarnuna í einari av landsins fremstu fyritøkum. Reyni Service er DAF- og TSM-góðskugóðkent og arbeiðir samsvarandi hesum krøvum.

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll av Teiginum á telefon 353065.

Umsókn skal sendast til: P/F Reyni Service
Boks 1068
110 Tórshavn
Att. Páll av Teiginum

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F